# KODA ger innrás í Føroyum




*KODA fer nú rættiliga at gera innrás í Føroyum og í Havn hava fleiri handlar í miðbýnum longu fingið skjøl at fylla út, um teir spæla tónleik í handlinum ella ikki*

*Modellmynd: Finnur Justinussen*

UPPHAVSRÆTTUR

*Ingrid Bjarnastein*

KODA fer nú rættiliga at gera innrás í Føroyum. KODA er eitt felag, sum vegna tónaskøld, yrkjarar og tónleikaútgevarar umsitur bæði føroysk, donsk og altjóða upphavsrættindini tá tónleikur verður spældur ella framførdur alment.

Fleiri handlar í Havn hava í hesum fingið nøkur pappír frá KODA, sum teir eru bidnir um at útfylla, tí tónleikur verður spældur í handlum ella matstovum teirra. Nógv kunnu tykjast ikki sørt skelkað av at fáa eina »rokning« fyri tónleik tey longu hava goldið fyri á fløgu, ella at skula gjalda fyri útvarpið einaferð afturat. Men hetta hevur felagið rætt til.

## Tónleikur ella ikki

KODA hevur ongantíð verið nakað serliga aktivt í Føroyum. Fá eru, sum hava hoyrt um tað, og uppaftur færri eru, sum gjalda til KODA. Útvarpsstøðir gjalda tó eitt ávíst gjald til KODA um árið fyri at spæla tónleik, og eigur eitt hvørt stað, sum er opið fyri almenninginum, eisini at gjalda pengar til KODA. Og aftur her kann tað tykjast eitt sindur tvørligt, at skula gjalda útvarpsgjald, og so eisini gjalda pening til KODA fyri at hava útvarpið frá í handlinum. Hetta kann tykjast sum eitt dupult gjald, men Kristian Blak, nevndarlimur í Komponistafelagnum í Føroyum sigur, at tað er tað als ikki.

– Um tú spælir tónleik í handlinum, matstovuni ella einum og hvørjum almennum plássi, so eigur tú at gjalda. Tað kann vera líkamikið, hvat tú brúkar fyri at fáa tónleikin fram, um tað er eitt sjónvarp, eitt radio, ein fløguspælari, internet ella hvat tað nú skal vera. Antin velur tú at hava tónleik ella ikki, sigur Kristian Blak.

Kristian Blak vísir á, at hetta er ein skipan, sum hevur verið í londunum rundan um okkum í fleiri ár, og nú er tað upp á tíðina, at hon eisini kemur til Føroya.

– Gjaldið er ikki so høgt, sigur Kristian Blak. – Og hetta er ein tænasta, sum tú velur at hava, júst sum allar tænastur. Og aðrar tænastur skalt tú jú gjalda fyri, og tí eigur tú eisini at gjalda fyri at spæla ttónleik.

Minsti prísur fyri at spæla tónleik alment er 420 krónur pr. fjórðingsár og annars er ein fermetraprísur eisini settur.

Kristian Blak sigur eisini, at í Føroyum hava vit bara havt konsert gjald, og tað KODA nú er farið í holt við er at upplýsa handlar og onnur um, at tey eiga at gjalda fyri tónleikin.

– Hetta er í fyrsta umfari upplýsing. Vit skulu ikki halda, at vit kunnu vera eins priviligerað í Føroyum, sum í útlondunum, og ikki noyðast at gjalda fyri tað onnur gjalda fyri. Allir handlar fáa nú upplýsingar um hetta, men tað fer at taka nøkur ár áðrenn hetta fer at virka sum tað skal í Føroyum, greiðir Kristian Blak frá.

Kompinstafelagið í Føroyum ynskir eisini at fáa hesa skipanina at virka sum hon skal í Føroyum, og upplýsingarfundur hevur eisini verið um hetta, har millum 250 og 270 limir tóku lut.

## Sølufremjandi

Fleiri handlar undrast á um hetta átakið hjá KODA er lógligt, og um tað ber til at fara fram á henda hátt.

Høgni Zachariassen, stjóri í 3´aranum í SMS, vissar um, at hesum er onki galið við.

– Eg veit eitt nú, at SMS hevur havt eina skipan við KODA í fleiri ár, sigur Høgni Zachariassen.

– Men tá tónleikur verður nýttur til sølufremjandi tiltøk, so eigur tú at gjalda KODA, og soleiðis er tað jú í handlum.

Eisini visti Høgni Zachariassen at fortelja um ringitónar til fartelefonir. Nógvir útlendskir tónleikarar og skrivarar hava fingið nógvar pengar burturúr hesum vælsignaðu ringitónunum.

Og so løgið sum tað ljóðar, so er tað heldur ikki loyvi hjá einum handli, hotelli ella líknandi at spæla »Eine, kleine Nachtmusik« hjá Mozart meðan tann í hinum endanum bíðar eftir rætta viðkomandi. Eisini í hesum førinum eiga pengar at verða goldnir til KODA.

Tó skulu tær ymsu fyritøkurnar nú heldur ikki halda, at KODA rættiliga fer at loypa á.

– Hetta er fyrst og fremst vinarlig upplýsing. Vit vilja vísa á, at vit eiga at gjalda fyri tónleik, júst sum alla aðrastaðni. Nú fara vit hóvliga og spakuliga til verka, men eg vænti ikki, at tað verður fyrr enn um nøkur ár áðrenn KODA fer at virka sum tað skal í Føroyum, sigur Kristian Blak at enda.



# Nornagestur og Columbus landa á Sandi

**- Ráfiskanøgdirnar í ár eru á leið tær somu sum í fjør, men úrslitið er ikki líka gott, sigur Magnus Jespersen, stjóri á Sandoy Seafood.**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*




*- Vit arbeiða at kalla hvønn dag bæði á Sandi og í Skopun, men tað er ikki altíð, at øll eru til arbeiðis í senn, sigur Magnus Jespersen, stjóri á Sandoy Seafood*

Í dag landa partrolararnir, Nornagestur og Columbus, tilsamans 200.000 pund á Sandi.

Magnus Jespersen, stjóri, sigur, at meginparturin av veiðini hjá trolarunum er upsi.

- Seinasta túr høvdu skipini hampuliga góðan upsa, leggur hann aftrat.

Í vikuni hevur Sandoy Seafood eisini keypt 40.000 pund av upsa frá P/F Beta, og sum skilst, var hetta rættiliga góður upsi.

Magnus sigur, at teir keypa ikki meira fisk hesa vikuna, tí hesi 240.000 pundini er nóg mikið hjá báðum virkjunum í oynni í eina viku.

Næstsíðsta mánadag fóru tey aftur til arbeiðis á báðum virkjunum í Sandoynni eftir summarsteðgin.

- Á Sandi hevur verið heldur minni at gjørt enn í Skopun hesar fyrstu dagarnar eftir steðgin, sigur stjórin.

Meðan tey arbeiða saltfisk á Sandi, verður flakaskorið og fryst í Skopun.

## Somu ráfiskanøgd

Magnus Jespersen sigur annars, at Sandoy Seafood hevur tikið ímóti á leið somu ráfiskanøgd í ár sum hesa tíðina seinasta ár. Hann hevði tó ikki neyvu tølini við hondina, tá ið vit frættu.

- Árið í fjør var eitt gott ár hjá flestu virkjum kring landið, men árið í ár hevur roynst misjavnt. Onkur letur hampiliga væl at; aðrir siga, at úrslitið í ár er slakari enn í fjør. Hjá Sandoy Seafood hevur árið higartil ikki roynst líka væl sum seinasta ár, sigur stjórin á Sandoy Seafood.

# Saltfiskur og fesk fløk á Delta

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*



*- Vit nýta tey somu fólkini at skera, salta og pakka; tí eru vanliga øll tey 40 fólkini til arbeiðis í senn á Delta Seafood, sigur Magnus Jespersen, stjóri*

Millum tey smáu fiskavirkini í Suðuroy, telist Delta Seafood á Tvøroyri, sum nú hevur sjey ár á baki. Eins og onnur virkir í oynni, hava tey ikki havt summarsteðg á Delta.

Magnus Jespersen, stjóri, sigur, at arbeiði á virkinum hevur verið rættiliga støðugt, men hendan vikan hevur verið heldur sløk.

- Tey 40 fólkini, sum arbeiða á virkinum, eru annars til arbeiðis at kalla hvønn dag, og fáir dagar eru við ongum arbeiði.

## Øll til arbeiðis í senn

Á Delta Seafood verður dentur lagdur á at virka saltfisk, men tá ið marknaðurin er nýtiligur, sendir virkið eisini fesk fløk av landinum.

Stjórin vísir á, at á Delta Seafood eru tað tey somu fólkini, sum skera, salta og pakka saltfiskin.

- Sostatt eru øll arbeiðsfólkini til arbeiðis í senn, sigur hann.

Delta Seafood og Fiskavirking á Tvøroyri samstarva um keyp av ráfiski.

- Hetta er eitt samstarv, sum tænir báðum pørtum til gagns, sigur Magnus Jespersen.

# Akraberg hevur fýra møguleikar

**- Tað skuldi ikki verið neyðugt við keyptari kvotu, tá ið sáttmálin sigur, at vit eiga kvotu eftir. Reiðarin, Anfinn Olsen, vildi helst, at Akraberg ikki fer undir útlendskt flagg, tí tá kann roknast við, at ein partur av verandi manning noyðist í land**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*




*Fyribils liggur Akraberg í Reykjavík og bíðar eftir, hvat spyrst burtur úr toganini um tey 500 tonsini, sum Føroyar skuldu átt eftir í Irmingarhavinum*

Í Sosialinum í gjár høvdu við samrøðu við reiðaran á Akrabergi, Anfinn Olsen, sum harmaðist um, at skipið noyddist at gevast í Irmingarhavinum, tí stríð er millum Føroyar og Grønland um kongafiskakvotuna.

- Sambært avtaluni, eiga vit 500 tons eftir í Irmingarhavinum, segði reiðarin avgjørdur.

## Fýra møguleikar

Anfinn sigur, at nú trupulleikar um kvotuna hava stungið seg upp, hevur Akraberg fýra møguleikar.

Tann fyrsti av øllum er, segði reiðarin, at vón er í hangandi snøri. Við hesum sipaði hann til, at landsstýrið ikki hevur slept málinum um tey 500 tonsini aftrat, sum vit halda okkum hava rætt til at fiska í Irmingarhavinum.

- Vit hava annars fýra møguleikarnar við Akrabergi. Ein er, at skipið verður liggjandi, annar at keypa kvotu frá grønlendingum, sum sáttmálin gevur møguleikar til, triði er at fara undir annað flagg, og tann fjórði er at fara á onkra heilt aðra veiði.

Anfinn sigur, at skal reiðaríið keypa kvotu, kostar tað pengar, og tað skuldi ikki verið neyðugt, tá ið sáttmálin sigur, at kvota er eftir.

Hvørja aðra veiði, Akraberg kundi farið á, sigur Anfinn, at tað dugir hann ikki at siga í løtuni.

- Vit vilja helst hava skipið undir føroyskum flaggi, bæði tí tað kostar at fara undir annað flagg og tí, at skipið hevur jú sína manning. Undir øðrum flaggi, noyðist ein partur av verandi manning helst at vera í landi, sigur reiðarin.

Ljósafelli er í løtuni á kongafiskaveiði í Irmingarhavinum, og sum skilst, fiska teir av keyptari kvotu.

Akraberg var ikki í vinnu í tíðini frá 10. desember síðsta ár til út í mars mánaða í ár. Í hesum tíðarskeiði varð verksmiðjan nútímansgjørd í Íslandi og Føroyum.

- Síðan skipið fór til fiskiskap aftur, hevur gongdin verið á góðari leið, sigur reiðarin, Anfinn Olsen.

Fyribils liggur Akraberg í Reykjavík og bíðar eftir, hvat úrslit spyrst burtur úr toganini millum føroyskar og grønlendskar myndugleikar um kongafiskakvotuna.

Í Fiskimálastýrnum, sigur Jens Helgi Toftum, at hann dugir ongar viðmerkingar at gera til málið í løtuni.

Jørgen Niclasen, Kaj P. Mortensen og Eyðfinn Finsson eru í hesum døgum í Grønlandi.